# Sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari ella pleygari til Psyk.

## Psykiatriski depilin søkir eftir starvsfólki til trý føst størv í skiftandi vaktum, tvey á starvsbrøki 0,8 og eitt á fullari tíð frá 1. januar 2011

Størvini eru tilknýtt kontakttoymum á Deild 2, sum er ein afturlatin deild við 8 seingjarplássum og Deild 1, sum er ein 5 daga psykiatrisk móttøkudeild við 14 seingjarplássum.

Psykiatriski depilin er í einari mennandi broytingartíð, har arbeitt verður við visjónini ”Samskipaða røkt og viðgerð”. Hetta merkir, at Psykiatriski depilin hevur ment eina toymisskipan, ið tekur støði í uppgávum, sum depilin hevur og í tí tilfeingi og teimum førleikum, sum eru á staðnum, og við at fáa øll starvsfólk við í hetta menningararbeiði. Í løtuni verður arbeitt víðari við at menna dygdina, sjúklingagongdir og ambulant virksemi. Psykiatriski depilin arbeiðir tvørfakligt og tvørsektorelt, har toymisskipan krevur, at starvsfólkini kunnu innganga í pliktað samstarv í ymsum toymum í mun til teirra uppgávu.

Á seingjardeildunum arbeiða tey í kontakttoymum. Arbeitt verður áhaldandi við at dygdarmenna røkt og viðgerð og umhvørvið á deildunum. Farið er undir at skipa tvørfakliga útbúgving í kognitivum viðgerðarhættum, og fleiri menningartiltøk eru sett í verk, eins og nýggj røktar- og viðgerðartilboð eru komin ella eru ávegis. Arbeitt verður við at innføra talgilda heilsuskipan í januar komandi ár.

**Psykiatriski depilin leggur dent á:**
- at viðvirka til at skapa góðar karmar til fakliga og persónliga menning
- at skapa eitt trygt og gott arbeiðsumhvørvi, sum er tengt at opinleika, engagement og refleksjón
- fakliga menning og arbeiðsgleði

**Vit søkja eftir stravsfólki, sum hevur:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari ella pleygari
- royndir og fakligan áhuga innan psykiatrisku sjúkrarøktina. Hevur áhuga at arbeiða við sjúklingum, sum seta høg krøv til dygdina í røktini og viðgerðini og at leggja til rættis einstakar sjúklingagongdir á deplinum
- tað er ein fyrimunur at hava arbeitt í toymisstrukturi áður
- kann arbeiða sjálvstøðugt og hevur hug at arbeiða á einum depli, sum er í støðugari menning
- er opin, vinarlig/ur og fyrikomandi
- hevur persónlig og faklig góð samstarvsevni bæði monofakliga og tvørfakliga

**Psykiatriski depilin kann bjóða:**
- góða individuella innleiðslu
- eitt mono– og tvørfakligt arbeiðsumhvørvi, sum er sermerkt av faklighei t, opinleika, álit, respekt
- eitt dynamiskt fjølbroytt og spennandi arbeiði, nógv avbjóðandi serumráði og møguleikar fyri kliniskari, pedagogiskari og ábyrgdarfullum uppgávum í mun til innlagdar og ambulantar sjúklingar, sum hava ymsan tørv á røkt- og viðgerð
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- ein depil í støðugari menning bæði fakliga og organisatoriskt

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja 304500 til Sunrid á Borg, deildarleiðara á D1, lokal 4421, t-post: lssunbo@ls.fo, Birgit Andersen, lokal 4402, t-post: lsbiran@ls.fo ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, t-post: lsberwe@ls.fo

**Umsóknarfreistin er:**
10. desember 2010 kl.12.00

Sosialurin 341800

Trivnaður

Størv á Landssjúkrahúsinum



www.ls.fo

Sjúklingurin í miðdeplinum

Granskingur & menning

# Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðdeildina G1

## Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi, har grundleggjandi sjúkrarøkt skal samantvinnast við háteknologi, so er møguleikin her

Vit søkja eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi í fast starv á starvsbrøki 0,8 ella eftir nærri avtalu, og eftir fleiri avloysarum í farloyvisstørv, bæði fyri sjúkrarøktarfrøðingar í barnsburðarfarloyvi og orsakað av intensivu útbúgvingini, sum starvsfólk á deildini er í gongd við. Setanirnar í farloyvisstørvum eru frá 1. januar til 31. august 2011 ella eftir avtalu.

Bráðdeildin er ein heild við fleiri ymiskum funktiónum, sum umfata intensiva deild, viðrakning, skaðastovu, bráðmóttøku og læknavaktina.

Tú kemur í mun til tørv og førleika at hava ymiskar arbeiðsuppgávur innan intensiva- og skaðastovuøkið

**Vit kunnu bjóða tær:**
- innleiðslu
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar
- starvsfelagar við góðum fakligum førleika
- starvsfelagar, ið ynskja at arbeiða í einum mennandi umhvørvi
- ein spennandi arbeiðsdag við góðum møguleika fyri egnari menning
- at arbeiða triðja hvørt vikuskiftið

**Tú hevur:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í viðgerð og røkt av sjúklingum við intensivum og bráðfeingis tørvi
- evni til skjótt at skapa tær yvirlit
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hug til fakliga menning og avbjóðingar
- góð samstarvsevni og er fleksibul
- eitt opið og jaligt sinni
- møguleika at arbeiða í skiftandi vaktum, dag-, kvøld- og náttarvaktum
- teldukunnleika
- hug og vilja at arbeiða við egnari fakligari menning og førleika
- ábyrgdarkenslu fyri at skapa góðan trivna á deildini

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar inna serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita við at ringja 304500, lokal 5811, til Jórun Højgaard, deildarleiðara, t-post: lsjorho@ls.fo ella til Astu Joensen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, t-post: lsastjo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er:**
6. desember 2011 kl. 12.00

# Sjúkrarøktarfrøðingur til A2/Føðideildina

## Eitt starv sum avloysari fyri sjúkrarøktarfrøðing á starvsbrøki 0,7 í skiftandi vaktum er leyst at søkja til setan 1. januar til og við 31. august 2011

Deildin er ein samansett eind við fýra ymiskum sergreinum. Endamálið við deildini er at veita viðgerð og røkt til barnakonur og nýfødd børn. Hetta verður gjørt í tøttum tvørfakligum samstarvi millum fakbólkarnar, sum eru tilknýttir deildini og heilsuskipanini annars.

Deildin er eitt spennandi og mennnadi starvsstað við nógvum framtíðar avbjóðingum.

**Tí søkja vit eftir sjúkrarøktarfrøðingi, sum hevur:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- hug til tvørfakligt samstarv
- ynski um mennandi avbjóðingar
- ynski um ávirkan á fakligu menningina
- kreativitet og fleksibilitet

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja 304500 til Heidi Bech Rasmussen, deildarleiðara á A2, lokal 5022 ella til Astu Joensen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102.

**Umsóknarfreistin er:**
2. desember 2010

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

*Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið*

*Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:*

***Landssjúkrahúsið***
***Lønar- og starvsfólkadeildin***
***FO-100 Tórshavn***